UTTAN ÚR HEIMI

# USA fjalir fangar í legum undir jørð

**Amerikanarar fjala fangar undir jørð, men fangarnir vita ikki, hvørjum landi teir eru í**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Amnesty International heldur seg kunna prógva, at amerikonsku myndugleikarnir fjala fangar í loyniligum fongslum undir jørð.

Felagsskapurin sigur seg vita um tveir menn úr Jemen, sum vóru fangar hjá amerikanarunum í hálvt annað ár. Teir sótu í einari fangalegu undir jørð uttan nakað samband við umheimin. Menninir, sum avhoyrdu teir, vóru altíð í gekkaskorti, men fangarnir komu ongantíð fyri rættin, og teir vórðu heldur ongantíð skuldsettir fyri nakað.

Amnesty Internatinal leggur afturat, at báðir menninir vistu ikki, hvørjum landi teir vóru í ta tíðina, teir vóru í varðhaldi hjá amerikanarunum.

Sharon Cristoph hjá Amnesty International sigur við AP, at tey hava illgruna um, at amerikanararnir hava fleiri fangar sitandi í slíkum loyniligum fangalegum. Hon sigur, at teir amerikonsku myndugleikarnir eiga at upplýsa, hvørjar fangar teir hava, og hvar teir eru, so altjóða umboð kunnu kanna viðurskifti teirra.

# Discovery ikki trygg enn

**Hóast tað eydnaðist at umvæla bjálvingina, hevur Discovery ikki fingið lendingarloyvi enn**

RÚMDIN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ætlanin hjá NASA var, at Discovery skuldi lenda aftur mánadagin, men í gjár kunngjørdi rúmdarumsitingin, at rúmdarferjan fær ikki lendingarloyvi enn.

- Fyrr høvdu vit ikki hugsað so nógv um tað, men enn eru vit ikki vísir í, at alt er í lagi, segði Wayne Hale, sum er leiðari á rúmdarferjudeildini hjá NASA, við Reuters.

Fyrradagin eydnaðist tað einum av manningini á Discovery at umvæla eitt brek, sum ferjan fekk, tá hon bleiv skotin út í rúmdina, men talsmenn hjá NASA søgdu í gjár, at teknikarar mugu kanna allar myndir av bjálvingini uttan á ferjuni eina ferð afturat, áðrenn tað ber til at siga, at alt er í lagi.

- Eg vænti, at vit noyðast at biðja ein av manningini fara út eina ferð afturat, segði Wayne Hale í gjár.

Tað var eitt brek við bjálvingini, sum gjørdi, at rúmdarferjan Columbia kolaðist upp, tá hon var á veg aftur á Jørðina fyri hálvum triðja ári síðani. Vanlukkan kostaði sjey mannalív.



*– Sjúklingurin er lektur, segði rúmdarmaðurin Stephen Robinson, tá hann hevði umvælt brekið uttan á Discovery. Men leiðslan í NASA kennir seg framvegis ikki trygga*
*Mynd: Reuters*

# Pengarnir renna í norska ríkiskassan og oljugrunnin

**Nú er tað bara Kuwait, sum hevur størri avlop enn Noreg**

BÚSKAPUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hvørja ferð ein króna kemur í norska ríkiskassan, kann Per-Kristian Foss, fíggjarmálaráðharri, leggja 30 oyru til viks, og fyribilstøl benda á, at av teimum 920 milliardum krónunum, sum koma í ríkiskassan í ár, kann fíggjarmálaráðharrin leggja 270 milliardir norskar krónur til viks.

Búskaparfrøðingurin Per Richard Johansen sigur við Aftenposten, at einki vesturlendskt ídnaðarland kann vísa á nakað, ið líkist hesum. Tað er bara Kuwait, sum kann vísa á eitt uppaftur betri úrslit enn Noreg. Har verða 37 oyru av hvørjari krónu løgd til viks.

Tað er serliga tann høgi oljuprísurin, sum kemur norðmonnum væl við, og tann almenni oljugrunnurin fyllist í hvørjum. Tá grunnurin bleiv stovnaður í 1995, fekk hann tvær milliardir krónur sum byrjunarpening. Við árslok verða væntandi umleið 1300 milliardir í honum.

## Turriklæðið vandamikið

Ein av teimum fremstu muslimsku leiðarunum í Bretlandi mælir nú teimum muslimsku kvinnunum har til at taka turriklæðið av høvdinum, so tær kunnu sleppa undan ágangi.

Síðani bumbuatsóknina í London tann 7. juli hevur bretska løgreglan fingið 269 fráboðanir um, at muslimar og aðrir minnilutar hava verið fyri ágangi, og tað er nógv meiri enn vanligt. Fyri at forða hesum mælir Zaki Badawi teimum muslimsku kvinnunum til at taka turriklæðið av høvdinum, tí so kunnu tær eftir hansara tykki kenna seg tryggari.

- Soleiðis sum støðan er, mæla vit kvinnunum til at taka turriklæðið av høvdinum, sigur Zaki Badawi við BBC. Hann er leiðari á Muslim College í London og limur í ovasta ráðnum hjá teimum bretsku muslimunum.

## Vanlukka skal kannast

Myndugleikarnir í Sudan hava kunngjørt, at teir ætla sær at kanna tilburðin, tá John Garang, varaforseti, doyði í einari tyrluvanlukku í grannalandinum Uganda fyri nøkrum døgum síðani.

Omar al-Bashir, forseti, segði í einari sjónvarpsrøðu mikukvøldið, at hann hevur sett eina nevnd at kanna tilburðin. Nevndin skal samstarva við teir ugandisku myndugleikarnar, sum eisini hava sett sær fyri at kanna, hvat veruliga hendi. ST boðaði í gjár frá, at heimsfelagsskapurin ætlar sær at taka lut í kanningini. ST-umboðsmaðurin í Sudan, Jan Pronk, gjørdi tó vart við, at fyribils bendir alt á, at talan var um eina vanlukku.

Fyrr í vikuni vóru harðir samanbrestir í Sudan ímillum løgregluna og viðhaldsmenn hjá John Garang, sum vilja vera við, at myndugleikarnir beindu fyri honum. Hesum hevur stjórnin víst aftur. Omar al-Bashir, forseti, sigur, at John Garang átti ein stóran lut í, at tað eyudnaðist at fáa enda á borgarakrígnum har suðuri í landinum, og at friðartilgongdin fer at halda fram.

## Semingsroynd heldur fram

Norðmenn hava gjørt av at halda fram við royndini at fáa semju ímillum stjórnina í Sri Lanka og teir tamilsku uppreistrarmenninar har norðuri í landinum.

Noreg hevur staðið á odda fyri semingsroyndum í Sri Lanka í fleiri ár. Fyri trimum árum síðani eydnaðist at fáa partarnar at semjast, men tær seinastu vikurnar hava tamilar beint fyri fleiri stjórnarhermonnum og politikarum, og tað hevur komið friðinum í vanda.

Norski semingsmaðurin Vidar Helgesen segði í gjár, at hann heldur fram við tingingunum við partarnar. Hann vildi tó einki siga um útlitini.

## Gamalt mál um Mick Jagger spøkir aftur

Gomul skjøl, sum tjóðarsavnið í London hevur almannakunngjørt, hava grivið eina gamla søgu um Rolling Stones-stjørnuna Mick Jagger framaftur. Skjølini stava frá einum tilburði í 1969, tá bretskir løgreglumenn funnu eitt sindur av rúsevninum cannabis heima hjá Mick Jagger. Málið endaði í rættinum, at Jagger bleiv dømdur at rinda 200 pund í bót.

Men tey gomlu skjølini, sum nú eru vorðin almenn, vísa, at hetta var ikki alt málið. Í skjølunum sæst, at løgreglan fann eisini ein pappírslepa við hvítum pulvuri, ið líktist rúsevninum heroin. Tað sæst eisini, at Mick Jagger var í øðini, tí hann vildi vera við, at ein av løgreglumonnunum hevði havt heroinið við sær. Men løgreglumaðurin Robin Constable stóð við sítt, men sambært Mick Jagger var hann til reiðar at sleppa ákæruni um heroinið, um hann fekk 1000 pund afturfyri.

Málið um heroinið kom ongantíð fyri rættin. Í skjølunum sæst, at Scotland Yard valdi at sleppa tí partinum av málinum, tí partarnir kundu ikki semjast um tað. Í skjølunum sæst eisini, at løgreglan metti Mick Jagger sum ein skilagóðan, ungan mann, men at hann hevði tilknýti til rúsevnismisnýtarar.